SKÚLIN VIÐ LØGMANNABREYT

# Summarroynd 2026

**<u>Góðu næmingar og foreldur í 8. flokki</u>**

Summarroyndirnar standa nú fyri framman. Til kunningar er at siga, at summarroyndirnar, eins og jólaroyndirnar og várroyndirnar, eru "venjingarroyndir" har næmingarnir fáa høvi til at fyrireika seg til endaligu próvtøkuna í 9. flokki. Niðanfyri eru tíðir og lærugreinir at síggja og á baksíðuni verður kunnað um reglur og forskriftir.

Blíðar heilsanir Skúlin við Løgmannabreyt

Jón Kragesteen, varaskúlatjóri

Tíðarkarmar fyri skrivligu próvtøkurnar 2026

| **Skrivligar próvtøkur** | | **8. flokkur** |
|---|---|---|
| mánadagin 18. mai 2026 | **DAN** | 08.15 – 09.00 Stavseting og mállæra<br>09.00 – 09.30 Steðgur<br>09.30 - 13.00 Framseting |
| týsdagin 19. mai 2026 | **STØ** | 08.15 – 09:15 Fimisrokning<br>09.15 – 09:45 Steðgur<br>09.45 – 13:45 Greiðslurokning |
| mikudagin 20. mai 2026 | **FØR** | 08.15 – 09.00 Stavseting og mállæra<br>09.00 – 09.30 Steðgur<br>09.30 – 13.00 Framseting |
| hósdagin 21. mai 2026 | **ENS** | 08.15 – 09.45 Máluppgáva<br>09.45-10.25 Steðgur<br>10.25 – 13.25 Framseting |
| fríggjadagin 22. mai 2026 | **FØR**<br><br>**DAN** | 08.15 – 09.00 Lesing<br>09.00 – 9.30 Steðgur<br>09.30 – 10.15 Lurting og lesing |

**<u>Reglur um royndir/próvtøkur</u>**

- Næmingar skulu vera í royndarhølinum í seinasta lagi kl. 08:00, tá ið hurðarnar verða stongdar.
- Næmingur, sum kemur ov seint, sleppur ikki at luttaka í viðkomandi royndarparti og verður biðin at møta aftur til næsta royndarpart - stundisliga.
- Um næmingur ikki fær møtt til tíðina, ella als ikki fær møtt, skal verða boðað frá á tlf. 302450 ella við at senda sms til 251978.
- Nýtsla av fartelefon er ikki loyvd, meðan royndin/próvtøkan er. Hevur næmingur fartelefon við í skúla, skal hon latast skúlanum í varðveitslu. Fartelefonin verður útflýggjað aftur, tá ið næmingurin er liðugur við royndina/próvøkuna. Í royndarhølinum er friður!
- Hevur næmingur spurning, skal hondin verða rætt upp, og so er at bíða til vaktin kemur. Loyvt er ikki at rópa ella at gera annað tekin.
- ikki er loyvt at at reisa seg frá stóli sínum, uttan við loyvi frá vakti.
- Ikki er loyvt at samskifta við nakran annan enn vaktirnar.

**<u>Brot á fyriskrivaðu reglurnar føra til burturvísing</u>**

**Føroyskt, danskt og enskt**

- Royndirnar verða gjørdar á teldu, sum næmingurin hevur fingið frá skúlanum
- Næmingar skulu hava sítt egna "headsett" við.
- Næmingar, sum hava brúk fyri at lána "headsett" frá skúlanum, skulu boða frá á skrivstovuni í seinasta lagi eina viku undan royndini.
- Næmingar kunnu brúka teldutøkar orðabøkur, sum t.d. www.sprotin.fo

**Fimisrokning**

- Royndirnar verða gjørdar á telduni, sum næmingarnir hava fingið frá skúlanum
- Í fimisrokning verður dentur lagdur á høvuðrokning. Ikki er loyvt at nýta roknimaskinu og heldur ikki forrit á telduni, sum kunnu nýtast sum roknimaskinur.
- Loyvt er at nýta bókina ”Støddfrøði – handbók”.

**Greiðslurokning - verður gjørd á pappíri!**
Her verður dentur lagdur á tað, ið vanliga verður nevnt ”problemrokning”. Her má næmingurin í størri mun skilja uppgávuna, finna upplýsingar til spurningarnar og loysa teir. Loysnin kann ikki standa einsamøll, men ein frágreiðing má vera, ið vísir, hvussu komið er fram til loysnina.

<u>Amboð at hava við til royndina í greiðslurokning eru</u>: skriviamboð, viskileður, linial, passari, vinkulmátari, tríkantur, roknimaskina, ”støddfrøði – handbók”, bøkur og annað tilfar úr undirvísingini

**Um hjálparmiðlar stendur á heimasíðuni hjá Próvstovuni:**
*“Um avmarkingar ikki eru ásettar í námsætlanunum fyri einstøku lærugreinarnar, kann próvtakarin brúka talgildar eins og aðrar hjálparmiðlar, sum eru brúktir í undirvísingini. Próvtakarin kann sostatt hava lærubøkur, uppgávur og annað tilfar við til próvtøkuna. Netið er í høvuðsheitum opið og kann nýtast í tann mun, tað er viðkomandi fyri próvtøkuavrikið.*

*Próvtakarin skal sjálvur framleiða próvtøkuavrikið og hevur ikki loyvi at samskifta við onnur undir próvtøkuni, hetta er eisini galdandi fyri tilgjørt vit. Hetta merkir, at avritingarforrit og hjálparmiðlar, sum heilt ella í stóran mun kunnu framleiða avrikið fyri próvtakaran, ikki eru loyvd. Sum dømi kunnu nevnast Photomath, Grammarly, ChatGPT og aðrir líknandi hjálparmiðlar. Mælt verður til, at skúlar steingja atgongdina til hesar og líknandi hjálparmiðlar, meðan próvtøkur fara fram.*

*Til próvtøkuna í fimisrokning í 9. flokki hevur próvtakarin ikki loyvi at brúka lummaroknara, heldur ikki á telduni ella á netinum.*

*Próvtakarin hevur bert loyvi at samskifta við umsjónarfólkini/vaktirnar, meðan hann er til próvtøku.”*

Les meira um kunning og leiðreglur í sambandi við skrivligu próvtøkur fólkaskúlans her:
https://provstovan.fo/provstovan/folkskulin/provtoekutilfar/kunning-og-leidreglur-1